# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 0916.
# Tíðarskeið: 25/03-01/04 - 2009

---

**Fólk við frá Fiskirannsóknarstovuni:** Petur Steingrund, Regin Kristiansen og Jens Arni Thomassen.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa.

**Eyka uppgáva:** Prøvar av toski vórðu tiknir til genetiskar kanningar fyri Petru Hansen, Fiskaaling.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini mikukvøldið 25/3 umleið klokkan 22. Tóku ein skurð við eini Thermistor-ketu út á Føroyabanka og byrjaðu at taka fiskistøðir norðalaga á bankanum hósmorgunin. Fríggjadagin 26/3 var ringt veður, so vit tóku bert eina CTD-støð, og tað sama var galdandi mánadagin 30/3. Tóku tilsamans 23 støðir – 16 grynri enn 200 m og 7 djúpari. Hetta vil siga, at 6 støðir lógu eftir – 4 grunnar og 2 djúpar. Vit komu á Havnina týskvøldið kl. 23 og landaðu mikumorgunin.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var nøkulunda eftir ætlan (umleið 400) fyri hýsu, men ikki fyri tosk ella upsa, tí vit fingu ov lítið.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 31. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 20. apríl.

**Fyribilsúrslit:** Meira var at fáa av hýsu, hóast mongdirnar framvegis vóru lítlar, meðan tað var nakað tað sama av toski. Minni var av upsa, men nógv meira var av glýsufiski. Magakanningarnar vístu, at lítið var til av nebbasild, men tó eitt vet meira enn í fjør. Í fjør fingu vit 32 kg av reyða knurrhana, men ongan í ár.

**Talva 1**. Veiða, nytrur og magar tikin á túri 0916.

| FISKASLAG | Kg í 2009. 23 hál: 16 grunn, 7 djúp | Nytrur | Magar | KG í 2008. 17 hál: 16 grunn, 1 djúpt | KG per grunt hál 2009/ KG per grunt hál 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| HÝSA | 1533.37 | 340 | 65 | 826.14 | 1.86 |
| GULLLAKSUR | 1518.27 | | | 0.00 | |
| HAVMÚS | 1239.99 | | | 0.00 | |
| TOSKUR | 1131.86 | 153 | 50 | 1280.36 | 0.88 |
| GLÝSUFISKUR | 597.96 | | | 158.52 | 3.77 |
| SILVURMURTUR | 539.05 | | | 0.00 | |
| UPSI | 436.12 | 137 | 35 | 771.66 | 0.57 |
| LOLIGO | 179.35 | | | 163.28 | 1.10 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 175.65 | | | 0.00 | |
| SVARTKJAFTUR | 149.88 | | | 0.00 | |
| LONGA | 93.81 | | | 80.56 | 1.16 |
| STINGLAKSUR | 68.71 | | | 0.00 | |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 66.19 | | | 29.32 | |
| GLASKVOYSA | 42.53 | | | 0.65 | |
| HAVTASKA | 40.56 | 8 | | 0.00 | |
| SKRAMBUL | 28.45 | | | 12.17 | |
| BLÁLONGA | 20.72 | | | 0.00 | |
| BROSMA | 20.36 | | | 0.00 | |
| KALVI | 17.25 | | | 24.64 | |
| SKØTA | 16.25 | | | 4.96 | |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 12.75 | | | 0.00 | |
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 12.39 | | | 0.00 | |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 10.94 | | | 0.00 | |
| STÓRI KONGAFISKUR | 9.74 | | | 2.08 | |
| LÁLLA | 9.19 | | | 0.00 | |
| MORA | 8.97 | | | 0.00 | |
| TUNGA | 7.37 | | | 22.65 | |
| LÝRUR | 6.83 | | | 0.00 | |
| SANDSPRØKA | 6.80 | | | 7.36 | |
| TRANTKONGAFISKUR | 5.06 | | | 0.00 | |
| LÍTLA BROSMA | 4.25 | | | 0.00 | |
| BLÁRIDDARI | 3.74 | | | 0.00 | |
| KNURRHANI | 2.98 | | | 1.03 | |
| SPÍSKASKØTA | 2.51 | | | 0.00 | |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 1.96 | | | 0.00 | |
| ROSSAMAKRELUR | 1.14 | | | 0.74 | |
| KIKARAFISKUR | 1.14 | | | 0.00 | |
| NEBBASILD | 0.85 | | | 0.10 | |
| OCTOPUS | 0.61 | | | 0.00 | |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 0.23 | | | 0.00 | |
| RÆKJA | 0.01 | | | 0.00 | |
| TILSAMANS | 8025.77 | 638 | 150 | | |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í Tur0916d.doc.

Petur Steingrund